# Sluppu við skrekkinum



*Tveir mans mundu komið rættiliga illa fyri, tá ið teir vóru við kranabili í Tjaldavík, har teir skuldu seta fóður av. Men brádliga skrædnaði jaðarin undan, so bilurin kopppaði á sjógv. Báðir menninir máttu loypa fyri lívinum.*

*Mynd: Leivur Nygaard*



*Mánadagin misti ein lastbilur tað mesta av eini last av spønplátum eftir vegnum í Øravík. Upptakið var stórt, men tíbetur var ongin annar bilur har á leiðini akkurát tá.*

*Mynd: Leivur Nygaard.*

**Tað kundi akkurát tað sama enda heilt galið, tá ið ein stórur lastbilur koppaði á sjógv í Tjaldavík sunnukvøldið. Sami bilaeigari í Suðuroy var fyri tveimum óhappum um vikuskiftið**

BILAÓHAPP
*Áki Bertholdsen*

Har ið ein skriða er lopin, er onnur væntandi.

Hetta gamla orðatakið mátti bilaeigarin, Gunnleif Midjord í Vági, ásanna um vikuskiftið.

Ikki minni enn tvær ferðir hetta vikuskiftið vóru bilar hansara fyri keðiligum óhappum.

Men samstundis heldur hann seg vera ómetaliga hepnan av tí at persónsskaðin ikki gjørdist størri enn hann var, tí serliga í tí eina óhappinum kundi tað einsvæl enda rættiliga galið.

Fyrra óhappið hendi sunnukvøldið, tá ið ein bilur hjá honum var við at seta alifóður av á brúnni í Tjaldavík.

Hetta hava teir gjørt fleiri ferðir fyrr. Men hesuferð hendi tað, at vegjaðarin skrædnaði. Tí fóru stuðulsbeinini undan kranabilinum so at hann koppaði á sjógv.

Ein maður stó beint við bilin við fjarstýringini til kranan og hann mátti loypa í havið undan bilinum, tá ið hann koppaði. Ein annar maður, sum var eisini stóð ímillum bilin og sjóvarmálan, royndi at renna framum bilin og tað eydnaðist akkurát. Ella næstan akkurát, tí beinið kom í klemmu ímillum kúfangaran á bilinum og ein kassa, sum stóð á brúnni. Stoyturin var so harður, at beinið brotnaði, men tað sigur eitt sindur um, hvussu nær við tað var eini rættiligari vanlukku.

Takið verður nú at fáa lastbilin uppaftur og tað verður ikki bara sum at siga tað. Hann hongur á sjálvum krananum, hálvur niðri í sjónum og tað skal lítið til, áðrenn hann loysnar og fer heilt á sjógv. Hann er longu farin ein metur longri oman, so bjargingarroyndin skal vera við størsta varsemi.

Fyrst er at fylla út, so at kranin, sum skal hiva koppaða bilin uppaftur, fær pláss at standa, hetta arbeiðið byrjaði í gjáramorgunin. Helst má lastin eisini takast av, tí hon stendur spílað upp. Samstundis skuldi ein kranabilur koma norðaneftir at royna at hiva hann upp.

### Misti pláturnar

Mánamorgunin var aftur ein lastbilur hjá sama eigara fyri óhappi. Tað hendi, tá ið hann var á veg suðureftir av Tvøroyri við fullari last av byggitilfari, mest spønplátum.

Spønplátur er ómetaliga hálar og í svinginum í Øravík, rósaði øll lastin omanav. Fýra reimar vóru krøktar í at halda plátunum, men tær hildu ikki. Tær slitnaðu ikki, men krókarnir gluppu úr, tá ið lastin fór at rósa.

Ein ørgrynna av plátum fóru sendandi eftir vegnum og bilaverjan framvið vegnum fór á einum strekki. men tíbetur var ongin bilur fyri, so í hesum óhappinum var bara talan um materiellan skaða - og eitt stórt upptak.

# Hevur gingið hampuligt í ár



*– Línubátarnir hava fingið eini 500 tons í miðal í fyrra hálvárið í ár og tað er hampiligt. Men fiskidagarnir eru ov fáir og bæði Pison og aðrir línubátar, hava verið noyddir at keypa dagar*

**Línubátarnir hava fingið eini 500 tons fyrra hálvár í ár og tað er á góðari leið, heldur fomaðurin í felagnum Línuskipum, Torleif Sigurðsson**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Tað hevur gingið heilt hampuligt hjá teimum føroysku línubátunum í ár.

Torleif Sigurðsson, formaður í felagnum Línuskipum, sigur, at bátarnir hava fingið eini 500 tons higartil í ár í miðal, summir minni og aðrir meiri og onkur er eisini, sum hevur fiskað 600 tons.

Hann heldur, at teir koma at liggja um 1.000 tons í ár í miðal og tað heldur hann, at teir kunnu vera nøgdir við sum so.

Hann sigur, at síðani 1997 hevur tað verið í ordan hjá línubátunum, men tað skerst ikki burtur, at 1998 var eitt óvanligt ár, tí tá vóru tað línubátar, sum fiskaðu 1.500 tons.

Formaðurin í Línuskipum fýslist kortini á, at tað er farið at trongast samanum hjá Línubátunum.

– Ein trupulleiki er, at umframt línubátarnir, eru tað nú eisini nógvir útróðrarbátar, sum eru farnir at fiska við línu.

– Tá ið prísurin á upsa lækkaði so nógv, fingu fleiri útróðrarbátar egningarmaskinu og fóru at fiska við línu.

– Sostatt eru línuskipini nú blivin nógv fleiri í tali enn tey vóru og tískil er tað eisini vorðið nógv trengri hjá línubátunum.

Ikki minst hevur tað elvt til ónøgd hjá línubátunum, at samstundis, sum bátarnir eru blivnir fleiri, er økið, sum teir hava at fiska á, eisini minkað rættiliga nógv.

– Stórir partar av leiðunum, vit fiskaðu á fyrr, eru nú friðað fyri líinubátar.

–Fyrr høvdu linubátarnir loyvi at fiska í klettin, men seinni vórðu grunnarnir undir Føroyum býttir sundur ímillum teir ymsu reiðskapirnar.

Síðani eru línubátarnir ikki slopnir inn um seks fjórðingar, men síðani er linjurnar í tí friðaða økinum lagdar soleiðis, at summastaðni vestanfyri, mugu línubátarnir halda seg 20 fjórðingar úr landi.

Hann sigur, at skipanin við at býta landgrunnin sundur virkaði væl. Men hann fýlist á, at inntriv verður gjørd í eina skipan, sum virkar væl, tí tað elvir bara til ónøgd og órógv.

Avleiðingin av øllum hesum er, at tað er ikki ein línubátur, sum klárar seg við teir 133 fiskidagarnar, sum teir hava í part og teir eru tí noyddir at keypa dagar.

Tí er støðan hjá útróðrarbátunum verri enn hjá øðrum skipabólkum.

Torleif Sigurðsson sigur, at nú hava íslendingarnir eisini friðað tær vanligu leiðirnar á suðureysturlandinum, har føroysku línuskipini plaga at royna.

– Sostatt loysir tað seg ikki hjá línubátunum at fara undir Ísland. Men tað ringasta er, at fiskileiðirnar undir Íslandi eru friðaðar í óásetta tíð og tað ber tí ikki til at fáa at vita, nær vit sleppa á tær aftur. Undir slíkum umstøðum ber ikki til at leggja til rættis - og tað ger tað enn trengri undir Føroyum, sigur Torleif Sigurðsson.

Hann leggur afturat, at hóast tað hevur gingið hampiligt hesi seinastu árini, er tað ikki hugsingur um at endurnýgja flotan, tí so væl gongur tað ikki.



# Grótið rullaði við hálvari ferð

**Tað, sum lættiliga kundi verið ein spennandi og forkunnug konsert, gjørdist heldur til eitt fáfongt kvøld, har tónleikurin stundum var góður, men stemningurin rakti ongantíð røttu hæddirnar**

KONSERT
*Heri á Rógvi*



*Flux spældu væl á heldur fámentu konsertini leygarkvøldið.*

*Mynd: Savnsmynd,*

Gamla Meiaríið er eitt hugnaligt stað. Soleiðis var eisini leygarkvøldið, tá Tónleikasamtakið Grót skipaði fyri konsert. Undan hesari konsertini hoyrdist, at klaksvíkingar í hópatal ætlaðu sær á líknandi konsert. Tískil vóru vónirnar eisini rættiliga góðar undan hesari konsertini, men tað skuldi vísa seg, at júst hetta tiltakið ikki hevði so storan áhuga millum íbúgvarnar í høvuðsstaðnum.

Tað kundi valla havt verið meira enn kanska tjúgu gjaldandi fólk til konsertina leygarkvøldið. Heldur vánaliga uppmøtingin gjørdi eisini, at startskotið varð eitt sindur seinkað.

À skránni vóru tveir bólkar; Flux og Diatribes. Diatribes var fyrst á skránni. Diatribes er ein av teimum bólkunum, sum hevur liva undir hungursmarkinum orsaka av heldur soltnu úrtøkuni á Prix Føroyum seinast. Bólkurin hevur so at siga sama skap, sum tá bólkurin luttók í Prix Føroyum.

Stílurin er ein harður rokkstílur, sum óivað kann sporast aftur í eyst og vest. Àhoyrarnir fingu eisini eina rættiliga harða framførslu hetta kvøldið. Fyriskipararnir høvdu eisini valt at selja oyraproppar, men hetta var tó ikki neyðugt at ogna sær til hesa fyrstu framførsluna.

Tankin aftanfyri eina sovorðna konsert er eisini at geva áhoyrarunum møguleikan at hoyra uppruna føroyskan tónleik, og samstundis eisini geva bólkunum møguleikan at spæla sínar egnu sangir.

Í so máta fingu bæði áhoyrarar og bólkar bæði í posa og sekk leygarkvøldið. Framførslan hjá Diatribes var tó fyri tað nógva merkt av, at rættiliga lítið av fólki var møtt upp, og tað tóktist sum um, at bólkurin var heldur »líkaglaður« enn nakað annað. Áhoyrarnir fingu møguleikan at vera »interaktivir«, og tað virkaði til tíðir sum um hetta var ein víðkaður venjingartími. Diatribes er tó væl fyri tónlistarliga, og tónleikurin hetta leygarkvøldið var eisini ein blandingur av teirra egnu løgum og løg hjá øðrum. Serliga okkurt av teirra egnu løgum var frálíka gott.

Flux stóð klárur sum bólkur nummar tvey hetta kvøldið. Eisini Flux hevur fingið eina broytta útsjónd fyri kortum; ein nýggjur gittarspælari var við hesuferð.

Tað, sum merkti hina fyrru framførsluna, merkti eisini hesa seinnu; lítli skarin ávirkaði. Tó var tað sum um, at kvøldið so at siga útviklaði seg sjálvt. Flux spæla rættiliga væl fyri tíðina, og tað skilst, at ikki lítið av venjing liggur aftanfyri hjá bólkinum. Bólkurin ljóðaði væl. Tað tykist sum um, at teir eru vorðnir eitt sindur umskipaðir í teirra tónleikastíli. Sigast skal, at teir spældi sera væl, og tað er bert at vóna, at hetta verður teirra »stílur« víðari.

Skarin, sum lýddi á, fekk aftur hesaferð høvi at luttaka, og tað vóru eisini fyri tað nógva vinir og kenningar, sum sótu í hugnaliga umhvørvinum á Meiarínum. Tað, sum skuldi vera intimt við eitt nú einans at nýta stearinljós, gjørdist eitt sindur for nógv av tí góða til tíðir, men bólkarnir skulu ikki lastast av hesum orsøk, tí teir vóru uttan iva eisini skuffaðir av heldur fámentu fjøldini hetta kvøldið.

Tað er bara at ynskja, at tað gongur betri næstu ferð, tí tørvurin á tílíkum tiltøkum er so avgjørt til staðar.

# Føroya Tele hevði stórt yvirskot

**Eisini Føroya Tele vísir hesar dagarnar á eitt gott hálvársúrslit. Tá tað leysa er fara burturav, so stendur Føroya Tele við 20,6 mío í yvirskoti.**

ROKNSKAPUR
*Heri á Rógvi*



*Føroya Tele hevði eitt gott hálvársúrslit at vísa á. Nýggja trongdin hjá føroyingum at nýta GSM fartelefonir hevur m.a. givið eitt íkast til kassan hjá Føroya Tele.*

Hesar dagarnar hevur tað so at siga regna inn við hálvársroknskapum. Eisini Føroya Tele hevur kungjørt teirra roknskap. Úrslitið hjá teimum gevur eisini leiðsluni møguleikan at fegnast. Heilar 20,6 mío standa eftir á kontoini, og hetta er bæði eftir skatt og tað sokallaða konsessiónsgjald til landskassan og raksturin av fjarskiftiseftirlitinum.

Góða úrslitið hjá Føroya Tele fyrra hálvár í ár er eisini munandi betri enn úrslitið fyri sama tíðarskeið í fjør, tá úrslitið gjørdist eitt yvirskot áljóðandi 14,5 mió. Hetta merkis sostatt, at talan er um ein vøkstur upp á 6,1 míó. Føroya Tele upplýsir, at 2,6 míо av hesum skyldast afturførdum avskrivingum.

Framhaldandi góða búskaparliga gongdin í Føroyum, og nýggi tørvurin hjá fólki, eru sjálvandi nakrar av orsøkunum til, at tað gongur so mikið væl hjá Føroya Tele.

Innanfyri GSM, Internet og uttanlandstelefoni gongur framá hjá Føroya Tele, og tað er eisini økti vinningurin á hesum økjum, sum fær æruna fyri framgongdina hesar fyrstu seks mánaðinar í ár.

Hóast størri kapping er á samskiftis økinum í Føroyum í løtuni, so vísir gongdin hjá Føroya Tele seg at vera framhaldandi góð. Føroya Tele ásannar tó, at stórar íløgur liggja fyri framman.

Gongdin higartil í ár ger, at Føroya Tele hevur góðar vónir fyri restina av árinum.


